

Fleiri oljuarbeiðarar missa sítt núverandi starv. Mynd: Helge Hansen

# Arbeiðsloysið veksur í norska ídnaðinum

**Jógvan Hugo Gardar**

28.10.2014 - 18:59

Oljan.fo

Norska arbeiðsloysisskipanin, Nav, hevur lagt fram nýggj tøl sum vísa gongdina á arbeiðsmarknaðinum. Tey siga nú at talið á arbeiðsleysum kemur at vaksa í 2015, og talið kemur at vera um 82.000.

Arbeiðs- og vælferðarstjóri í Nav, Joakim Lystad, sigur at tey nú eru eitt sindur meir dapurskygd um gongdina í Noregi.

Nav metir at tað í ár koma at vera 6000 fleiri arbeiðsleys enn í 2013, og at talið kemur at økja í 2015. Talið á arbeiðsleysum er mett til 2,8 prosent av teimum arbeiðsføru, og hetta kemur at økja til umleið trý prosent í 2015.

Framskrivingin hjá Nav sigur at fleiri koma í arbeiði aftur í 2016, tá 2,9 prosent fara at vera uttan arbeiði.

Tað er serliga í oljuídnaðinum at tað er roknað við fleiri arbeiðsleysum. Millum 10.000 og 13.000 í oljuídnaðinum og atknýttu vinnunum fara at missa arbeiði í ár og í 2015. Ein partur av hesum kemur tó at fáa arbeiða hjá øðrum veitarum í somu vinnu. Nøkur oljufeløg minka um virksemi, meðan onnur eru á veg at byggja upp sítt virksemi.